# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Vestmenningar tikið oddasessin



*Eldsálin úr Vestmanna, Jón Mikkelsen, eigur stóran part av æruni fyri sterku støðu felagsins í føroyskari telving*

**Støðan eftir 3. umfar**

| 1. deild | Stig |
|---|---|
| Vestmanna 1 | 10 |
| Klaksvík 1 | 9½ |
| Sandavágur | 7½ |
| Havnin | 3½ |
| Klaksvík | 3 |
| Vestmanna 2 | 2½ |

| 2. deild | Stig |
|---|---|
| Klaksvík 3 | 6½ |
| Toftir | 6 |
| Havnin 3 | 5 |
| Kollafjørður | 3½ |
| Toftir | 3 |
| Sandavágur 2 | 2½ |

| 3. deild A | Stig |
|---|---|
| Vestmanna 3 | 9 |
| Sandavágur 3 | 6½ |
| Skopun | 5½ |
| Klaksvík 4 | 3 |

| 3. deild B | Stig |
|---|---|
| Havnin 4 | 5½ |
| Gøta | 4 |
| Rókur | 3½ |
| Vestmanna 4 | 3 |

| Unglingar | Stig |
|---|---|
| Klaksvík | 5 |
| Havnin | 4 |
| Rókur | 3 |
| Vestmanna | 3 |
| Sandavágur | 3 |
| Skopun | 2 |

**Triðja umfar í liðkappingini í talvi varð telvað í vikuskiftinum. Klaksvíkingar snávaðu, meðan Vestmenningar gjørdust nýtt oddalið við einum sigri á øðrum liði hjá Klaksvík**

TALV
*Ólavur Simonsen*
*olavur@sosialurin.fo*

Fyrsta liðið hjá vestmenningum fekk vitjan av øðrum liði hjá Klaksvíkini. Her vóru vestmenningar greiðir favorittar á øllum fýra borðum.

John Rødgaard, sum er danski suðuroyingurin hjá vestmenningum, vann á Rana Baldurssyni í einum sera jøvnum talvi. Drúgvu royndirnar og tann haldgóði spælistílurin hjá John gera, at honum bert tørvar ein sera lítlan fyrimun til at vinna eitt talv. Hetta var eisini lagnan, sum Rani fekk sunnudagin, har John vísti sína styrki í endatalvinum.

Havnarmaðurin hjá vestmenningum, Carl E. N. Samuelsen, vann ein tryggan sigur á Tummas M. Sølsker, har Tummas var sera kroystur og mátti leggja kong eftir bert 30 leikir.

Hvalvíkingurin hjá vestmenningum, Martin Brekká, lat eina finnu tíðliga í byrjanarspælinum fyri virkið spæl móti Esberni Christiansen. Hetta gav eisini ávøkstur, tá Esbern seinni í talvinum misti ein riddara og harvið tað heila stigið.

Vestmenningurin hjá vestmenningum, Samson Højgaard, var einasti, ið mátti lata stig móti Rógva Dragaberg í einum sera buldraligum talvi, og harvið vunnu vestmenningar 3-1.

### Klaksvíkingar snávaðu

Eftir tveir knúsandi 4-0 sigrar fyrstu tvey umførini, stóð tap fyri durum móti einum ungum Sandavágsliði. Olaf Berg og Torkil Nielsen vunnu á ávíkavist fyrsta og øðrum borði móti Ólavi Simonsen og Finnbirni Vang. Terji Petersen gjørdi, sum tann einasti klaksvíkingurin, sína skyldu við at vinna á unga talentinum Rógva E. Nielsen. Á fjórða borði megnaði Haldur S. Johansen bert at fáa javnleik móti unga sandavágsinginum Jón Gregersen.

Við tapinum móti Sandavági er Klaksvík 1 dottið niður á annað pláss við einum hálvum stigi aftanfyri Vestmanna 1. Hinvegin hevur Sandavágur otað seg longur upp eftir stigatalvuni og liggur bert tvey stig aftanfyri Klaksvík 1.

Kappingin í 1. deild hevur nú býtt seg í tveir partar, har Vestmanna 1, Klaksvík 1 og Sandavágur hava rykt seg leys frá hinum liðunum.

### Varaborgarstjórin tók á bóli

Havnin, ið hevur havt tað trupult við fólki í ár, fekk ein kærkomnan sigur móti øðrum liði hjá vestmanna við at vinna 2½-1½.

Mest óvantaða úrslitið í botndystinum var javnleikurin millum varaborgarstjóran í Vestmanna, Jón Mikkelsen, og Herluf Hansen. Við einum ratingmuni á 389 stig skuldi Herluf veri tryggur vinnari á pappírinum, men varaborgarstjórin, eldsálin og formaðurin í Vestmanna talvfelag vildi hetta øðrvísi og ognaði vestmenningum eitt hálvt stig í betri støðu.

At góð úrslit fella á eldsálina í Vestmanna talvfelag, er bert at frøast yvir. Jón hevur sum formaður slóðað fyri og skapt eitt felagsumhvørvi, sum heilt sikkurt er eitt av best riknu ítróttarumhvørvum í landinum. Tað er eisini heilt sikkurt, at hetta hevur havt stóra ávirkan á, at Vestmanna hevur havt so góð úrslit í bestu deildini seinnu árini og eisini hevur megnað at vinna sær tvey lið í fyrstu deild.

## Arsenal aftur á ovastu rók

**Við einum tryggum 3-1-sigri á Reading í kvøld er Arsenal nú aftur á odda í Premier League**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Verjukenda spælið hjá Reading riggaði væl ímóti Arsenal í kvøld, tá ið liðini brustu saman á Madejski Stadium. Arsenal hevði trupult við at fáa hol á, men tá ið hol var fingið á, var eingin trupulleiki.

Tað sá leingi út til, at hálvleiksstøðan skuldi vera 0-0. Men hetta vildi Mathieu Flamini øðrvísi, og legði Arsenal á odda ein minutt undan steðginum.

Í seinna hálvleiki kom Reading longri fram á vøllin, men eydnaðist ikki serliga væl. Bara sjey minuttir inn í seinna hálvleik økti Emmanuel Adebayor til 2-0 eftir eitt upplegg frá Cesc Fabregas.

12 minuttir fyri leiklok økti Alexander Hleb til 3-0, men enski landsliðsleikarin, Nicky Shorey, minkaði um munin tríggjar minuttir fyri leiklok.

3-1 gjørdist eisini endaliga úrslitið, og Arsenal kann nú aftur kalla seg oddalið í Premier League. Teir liggja púra javnt við Manchester United - 30 stig og málmun áljóðandi +17, men Arsenal hevur spælt ein dyst færri.